SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Alt bendir á, at Ísrael hevur brotið amerikanska lóg og vápnaavtaluna við okkum*

*(amerikanska uttanríkisráðið)*

# Ísrael breyt vápnaavtalu

**Ísrael brúkti amerikanskar tyssibumbur í í krígnum við Hizbollah seinasta summar**

– Ísrael hevur eftir øllum at døma brotið avtaluna við okkum, segði talsmaðurin hjá amerikanska uttanríkisráðnum, Sean McCormak, í gjár. Hann legði afturat, at málið verður nú latið Kongressini, sum so skal taka støðu til, hvat skal henda.

Amerikanska umsitingin hevur fingið eina fyribilsfrágreiðing, sum vísir, at ísraelska hermegin brúkti amerikanskar tyssibumbur í Suðurlibanon í fjør, og New York Times skrivar, at frágreiðingin hevur fingið fleiri at mæla til, at USA eigur at revsa Ísrael.

Embætismenn í uttanríkisráðnum og verjumálaráðnum Pentagon hava sagt, at Ísrael breyt amerikonsku lógina um vápnahandil, tá landið brúkti tær amerikonsku tyssibumburnar í Suðurlibanon. Onnur halda, at Ísrael brúkti bumburnar í sjálvverju fyri at steðga rakettálopunum hjá Hizbollah á ísraelskar býir.

Tyssibumbur spjaða smáar bumbur um eitt stórt umráði, og tær eru ætlaðar til álop á hermenn hjá fíggindanum. Síðani kríggið millum Ísrael og Hizbollah seinasta summar eru fleiri túsund tyssibumbur funnar ymsastaðni í Suðurlibanon, og kanningar hava víst, at talan er um bumbur, sum Ísrael fekk úr USA fyri nógvum árum síðani. Keldur hjá ST hava fyrr sagt, at 30 libanar eru deyðir og 180 aðrir særdir av tyssibumbum síðani kríggið. Sambært ST brúkti Ísrael meiri enn eina millión tyssibumbur í krígnum við Hizbollah.



*Bretski minuserfrøðingurin David Oldaesin varð illa særdur, tá hann royndi at oyðileggja eina ísraelska tyssibumbu í Suðurlibanon í november í fjør.*

# Kofi Annan heiðraður

**Fyrrverandi ST-aðalskrivarin fær heiðursløn frá minnisgrunni Olof Palme**

Á hvørjum ári letur Grunnurin til minnis um Olof Palme eina heiðursløn, og í gjár kunngjørdi leiðslan, at heiðurslønin fyri 2006 verður latin fyrrverandi ST-aðalskrivaranum Kofi Annan og mannarættindastríðsmanninum Mossad Mohamed Ali, sum er úr sudanska landspartinum Darfur.

Teir báðir býta ársins heiðursløn sínamillum og fáa tískil 425.000 krónur í part.

Grunnurin til minnis um Olof Palme varð stovnaður í 1986 ella sama ár, sum svenski forsætisráðharrin bleiv myrdur í Stockholm. Tað vóru tey avvarðandi hjá Palme og svenski javnaðarflokkurin, sum stovnaðu grunnin.



*Kofi Annan heiðraður.*

# Til Afrika við fullari skjáttu

**Í dag fór kinesiski forsetin, Hu Jintao, undir eina rundferð í Afrika, og hann er ikki ørindaleysur.**

Fyri tveimum mánaðum síðani vóru fleiri afrikanskir leiðarar á fundi í Beijing eftir innbjóðing frá kinesisku stjórnini. Tá játtaði kinesiska stjórnin at lata afrikonsku londunum slakar 30 mia. krónur í láni og kredittum og at tvífalda búskaparligu hjálpina til lond í Afrika.

Vitjanin hjá Hu Jintao í Afrika, sum byrjaði í dag, er annað stig hjá Kina at fáa fótin fastan í Afrika, skrivar DPA. Talsmaðurin hjá kinesisku stjórnini, Liu Jianchao, sigur við tíðindastovuna, at ferðin er eitt sera týðandi diplomatiskt stig, og at forsetin hevur fleiri tilboð við sær í skjáttuni.

Á Afrika-ferðini skal Hu Jintao millum annað vitja Sudan. Kina hevur sýtt fyri at taka undir við, at ST sendir hermenn til landspartin Darfur uttan so, at sudanska stjórnin tekur undir við tí.

## STUTT SAGT

### Ætlar at tingast

Forsetin í Afganistan, Hamid Karzai, sigur seg nú vera til reiðar at tingast við mótstøðurørsluna Taliban. Á einum fundi við átrúnaðarleiðarar í Kabul segði forsetin, at hann er sinnaður at tosa við Taliban fyri at royna at fáa eina friðaravtalu í lag við rørsluna. Leiðslan í Taliban hevur fyrr sagt, at hennara fremsta mál er at reka allar útlendskar hermenn úr Afganistan, og rørslan hevur hert bardagarnar í seinastuni. Tað sást týðiliga í fjør, og 2006 var eisini tað blóðugasta árið, síðani Taliban varð rikin frá valdinum í 2001.

### Arbeiða drukkin

Ein nýggj frágreiðing avdúkar, at tað er so sum so við arbeiðslagnum á svenska kjarnorkuverkinum Forsmark. Í frágreiðingini stendur millum annað, at tað hendir meiri enn so, at starvsfólk eru drukkin, meðan tey eru til arbeiðis á verkinum, og at hetta í fleiri førum kundi havt elvt til deyðsvanlukkur. Eisini verður víst á, at talið av óhappum á Forsmarkverkinum er økt munandi tey seinastu árini. Í 2005 vóru 22 óhapp skrásett, men í fjør kom talið heilt upp í 68, stendur í frágreiðingini.

### Politisk morð

Ein kanningarnevnd hjá stjórnini í Filipsoyggjunum er komin til ta niðurstøðu, at herurin hevur beint fyri fleiri hundrað vinstrasinnaðum fólkum tey seinastu seks árini. Nevndin sigur, at talan var um politisk morð, og at leiðslan í herinum eigur at standa til svars fyri illgerðirnar. Jose Melo, fyrrverandi hægstarættardómari, sum hevur staðið fyri kanningini, sigur við Reuters, at tað vóru smáar deildir hjá herinum, sum framdu morðini, og at summir av leiðarum teirra settu kikaran fyri tað blinda eygað.